# Sandá var øll grá

**Tá ið ein fyritøka í seinastu viku gróv fyri jarðhita við eini hús á Argjum, var har óvæntað so nógv grundvatn, at dustið fór við vatninum oman eftir Sandá**

Randi Jacobsen

Tað hevur altíð verið sagt, at í Føroyum er yvirflatuvatn og ikki grundvatn.

Men hetta er ikki galdandi fyri allar Føroyar.

Eini hús á Argjum skulu hava jarðhita, og mannagongdin er, at grivið verður eitt 200 metra djúpt hol niður í jørðina.

Ein svensk fyritøka kemur til Føroya at bora hesi hol, og fyirtøkan kemur, tá ið eitt ávíst tal av umbønum er.

Í seinastu viku varð grivið við eini sethús á Argjum.

Luft varð pumpað niður í holið fyri at fáa dustið upp, og tað varð so ført við vatninum yvir í eina bingu, har tað stóð og botnfall.

## Fleyt yvir

Men púra óvæntað var har so nógv grundvatn, at tað fleyt yvir, fór út í eina lítla á og víðari oman í Sandá. Eftir lítlari løtu var alt vatnið í ánni grátt.

Tað kom óvart á bæði fyritøkuna og Tórshavnar kommunu, at so nógv grundvatn var.

Fyritøkan hevur verið og borað í Suðuroynni, har einki vatn var, og heldur ikki var nakað vatn, tá ið borðað varð oman fyri farstøðina í Havn.

## Gjørt mannagongdir

Súni Christiansen, leiðari á umhvørvisdeildini í Tórshavnar kommunu sigur, at jarðhiti er so nýtt hugtak í Føroyum, at ongar fastar mannagongdir hava verið. Nú hevur kommunan avtalað við fyritøkuna, at hvørja ferð farið verður at bora í kommununi, skal kommunan fáa boð, so kommunan kann ávísa hvar nærmasta kloakk er. Hetta er fyri at sleppa undan, at dustvatn rennur út í nakra á. Allar umsóknir skulu á borðið hjá umhvørvisdeildini.

Henda dagin skolaði dustvatnið í Sandá skjótt burtur, men tó so helt onkur seg síggja síl í ánni við búkinum upp. Dustið er ikki eitrandi, men tað kann seta seg í toknurnar hjá sílunum.



*Eftir lítlari løtu var øll áin grá*

# Vatn er allastaðni

**Grundvatnið í Føroyum kann ikki sammetast við vatnið í Danmark**



Randi Jacobsen

Spurningurin um grundvatn er í Føroyum ella ei, er ikki so lættur at svara, tí tað veldst um, hvat vit skilja við grundvatn.

Hetta sigur Kári Mortensen, sum umsitur orkumál á Jarðfeingi.

Vit hava ikki so nógv og støðugt grundvatn eins og í Danmark, har tað kann brúkast til drekkivatn.

Hinvegin eru ongar kanningar gjørdar av vatninum í undirgrundini hjá okkum, tí tær kanningarnar hevur Jarðfeingi ikki orku til at gera.

Men tær boringarnar, sum gjørdar verða nú, geva nakað av vitan ókeypis.

Kári Mortensen sigur, at tá ið borað verður á landi, kemur man altíð frr ella seinni niður á vatn, ella rættari seyrar vatnið gjøgnum rivur inn í boriholið.

Tað er ógvuliga ymist, hvussu nógv vatnið er. Í onkrum boringum eru komnir 30 rúmmetrar av vatni um tíman, tá ið komið er niður á botn, onkrastaðni tríggir rúmmetrar, og tað hava eisini verið 100 rúmmetrar um tíman.

Tað longsta tey hava borað, áðrenn komið er niður á vatn, er 30 metrar.

## Nóg stóra bingju

Kári Mortensen hevur ikki havt nakað serligt við óhepnu borgingina á Argjum at gera.

Mannagongin er, at tá borað verður, verður boriðdustið blást við trýstluft gjøgnum eina slangu yvir í eina bingju.

Á Argjum hendi so tað, at vatnið var meira enn væntað, og tí fleyt yvir. Tí kunndi verið sloppið undan, um vatnið fór úr einari bingju og yvir í eina aðra, so dustið náddi at botnfella.